## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn. Seinnapartin támut veður ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 5 og 9 stig.

– – –
September mánaði var eitt sindur lýggjari enn vanligt, 9,6° móti miðal 9,2°.
Eisini var september mánaði óvanliga turrur, 69,3 mm, móti miðal 139,2 mm

# Tipoldurommubeiggin situr undir

SLEKT
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Drúgvt áramál er í millum tey bæði á hesi myndini og myndin man nærkast ytsta marki, tá tað snýr seg um at avmynda samtíðarfólk á lívi. Í dag kann tú alt møguligt við teldum, men tað er ein onnur søga. Maðurin eitur Richard Jacobsen, hann 90 ára gamal og hevur verið bóndi í Nólsoy alla sína tíð. Hann var føddur fimm ár aftaná at telefonin kom til til Føroya og tá hann var eitt ára gamal sakk Titanic. Tipoldurommubeiggadóttirin eitur Sigrid Heinina Kristiansdóttir Dam og er úr Havn.

Og hvussu hongur so hetta saman, soleiðis í beinleiðis linju. Tann eina av teimum 16 tipoldurommunum hjá Sigrid æt Luffa í Nólsoy, Oluffa Holm og hon var systir Richard. Luffa átti ein son, ið æt Mikkjal Holm. Hann er sostatt ein av teimum átta oldurabbunum hjá Sigrid.

Mikkjal átti eina dóttir í_ eitur Heinina Hansen, hon er ein av teimum f_ra langommum hjá Sigrid. Heinina eigur eina dóttir, sum eitur Ann Justinussen, tað er ein fryntlig kvinna, sum dagliga starvast á Konditarínum. Hon er onnur av ommunum hjá Sigrid. Ann eigur eina dóttir, sum eitur Katja Dam og Katja er móðir Sigridar.



### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 15 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 28 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 17 |
| New York | 18 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 974 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað. Eitt annað lágtrýst, 999 hPa. á 48N-33V fer móti Skotlandi.




Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum grynnist, meðan lágtrýstið í útsynning úr Hvarvinum fer skjótt eystureftir.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/10 kl. 06[00]– 11/10 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 10/10 kl. 06[00]– 11/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 51,5 mm

Spf.
HESTPRENT
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212

## VESTFALLSKYRRINDI

10. okt.: Seinna kvarter
14. okt.: Mánin næstur jørðini
16. okt.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. okt | 03.25 | 15.51 | 02.25 | 14.51 | 02.40 | 15.06 | 05.25 | 17.51 | 06.25 | 18.51 | 01.40 | 14.06 | 00.40 | 13.06 | 03.40 | 16.06 | 04.40 | 17.06 | 03.10 | 15.36 | 04.25 | 16.51 |
| 13. okt | 04.15 | 16.40 | 03.15 | 15.40 | 03.30 | 15.55 | 06.15 | 18.40 | 07.15 | 19.40 | 02.30 | 14.55 | 01.30 | 13.55 | 04.30 | 16.55 | 05.30 | 17.55 | 04.00 | 16.25 | 05.15 | 17.40 |
| 14. okt | 05.04 | 17.28 | 04.04 | 16.28 | 04.19 | 16.43 | 07.04 | 19.28 | 08.04 | 20.28 | 03.19 | 15.43 | 02.19 | 14.43 | 05.19 | 17.43 | 06.19 | 18.43 | 04.49 | 17.13 | 06.04 | 18.28 |
| 15. okt | 05.52 | 18.18 | 04.52 | 17.18 | 05.07 | 17.33 | 07.52 | 20.18 | 08.52 | 21.18 | 04.07 | 16.33 | 03.07 | 15.33 | 06.07 | 18.33 | 07.07 | 19.33 | 05.37 | 18.03 | 06.52 | 19.18 |